# Oddamenn í bretska oljuídnaðinum higar í heyst

Tá eitt stórt føroyskt ferðalag við heilum tveimum landsstýrismonnum vitjaði í skotsku oljubýnum Aberdeen nakað herfyri hittu teir fleiri av oddafiskunum í bretsku oljuvinnuni, teirra millum ovasta almenna stjórin í oljuvinnuni, John d'Ancone. Hann er stjóri í OSO, sum stendur fyri Offshore Supply Office og er tað hann, sum meira ella minni stingur út í kortið, hvussu oljuvinnan verður útbygd í Bretlandi.

Í sambandi við tá vitjanina bevð táverandi landsstýrismaður í orkumálum, Svend Åge Ellefsen, John d'Ancona og øðrum leiðandi oljufólkum til Føroya at vitja í juli.

Henda vitjanin er nú útsett. Landsstýrið hevur m.a. ynskt at fáa stundir at gjøgnumganga frágreiðingina frá Oljuráðleggingarnevndini áðrenn vitjanina.

Vit hava spurt Maritu Petersen, sum umsitur undirgrundarmál í landsstýrinum, hví avgjørt er at útseta hesa vitjan.

Hon sigur, at vit skulu hava eitt grundarlag at byggja á, áðrenn vit taka nakrar avgerðir viðvíkjandi víðari kanningum av undirgrundini og eini møguligari komandi oljuvinnu. Og hetta grundarlag hava vit ikki fingið enn.

Marita Petersen sigur, at tá nýtt landsstýri varð skipað, varð hetta málið eisini viðgjørt, og varð tá semja um at útseta vitjanina hjá teimum bretsku oljufólkunum til eina ferð í heyst.

jan


## Fráboðan um góðkenningar

Við hesum verður gjørt kunnugt, at landsstýrið við heimild í § 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd hevur góðkent, at Henrik Søderstrøm Nielsen, Vágur, hevur loyvi at roykja áll á matr. nr. 368 í Vági, fyribils í 1 ár, at rokna frá dags dato.

**Føroya Landsstýri, 16.06.1993.**

## Fráboðan um góðkenningar

Við hesum verður gjørt kunnugt, at landsstýrið við heimild í § 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd hevur góðkent, at P/f Nósi v/Henry Klein í Oyndafirði ger og rekur eitt góðskingarvirki í fyribils 2 ár, roknað frá dags dato.

**Føroya Landsstýri, 16.06.1993.**




*Stjørnan og Polarhav vera verandi í Leirvík. Skiparar, manningar og Ósmund hava keypt bátarnar aftur. Mynd: Jan Müller*

*Realurin hevur útsølu:*

# Selt fimm trolarar innan eitt samdøgur

*– Nú er bert Føstuvarði og Túgvuvarði eftir av teimum seks trolarunum, vit keyptu á tvingsilsølu týsdagin, men føroyskur áhugi er eisini fyri hesum skipum, sigur Atli Dam, stjóri í Realinum*

Skjótt gekk at sleppa av við ein stóran part av trolarunum, sum Færøernes Realkreditinstitut keypti á tvingsilssølu týsdagin. Realurin var eina løtu stórreiðari, tá teir áttu Føstuvarða, Túgvuvarða, Polarhav, Stjørnuna, Føniks og Steintór.

–Eitt felag á Tvøroyri við fakfeløgum og starvsfólk á Flakavirkinum, hava sett pening í Føniks. Teir fingu trolaran fyri 15,7 milliónir krónur, sigur Atli Dam, stjóri í Realinum.

Føniks er fyrrverandi Heinaberg, strandingar bygdu trolaran á Skála Skipasmiðju.

Steintór er seldur til eitt felag í Hvalba fyri 17,2 milliónir krónur. Tað er skiparin Jóan Pauli Hammer sum saman við manningini og fakfeløgum, sum hevur keypt Steintór

Tvingsilsølan av Niels Paula er útsett.

### Verandi í Leirvík

Trolararnir Polarhav og Stjørnan verða verandi í Leirvík.

–Vit hava selt trolararnar fyri 16 milliónir stykkið til eitt felag, har skipararnir og manningarnar og onkur av teimum gomlu eigarunum eru uppií, sigur Atli Dam.

*Er Ósmund Justinussen uppi í?*

–Ja, hann er ein av eigarunum og spyr tú hvussu hann kann vera við, tá hann ikki hevur fingið tað at ganga fyrr, so er svarið einfalt. Hjá Realinum snýr tað seg ikki um persónar, men um peningur er aftanfyri tilboðið, sigur Atli Dam.

### Vágatrolararnir

Realurin hevur nú Føstuvarða og Túgvuvarða eftir. Áhugi er fyri skipunum.

–Vit hava fingið boð uppá skipini, men tey hava verið í lægra lagi, men eg ivist ikki í at vit sleppa av við tey, sigur Atli Dam, stjóri á Realinum.

júsunus


**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mánadag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19268.

**Amnesty International**
Skrivstovan í Vágsbotni er opin mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 11–16. Tlf. 15816.